# øgtingið

## vald 19. januar 2008


Poul Michelsen, løgtingsmaður, Tórshavn - 341 atkvøður


Magni Laksáfoss, landsstýrismaður, Hvalvík - 979 atkvøður


Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn - 641


Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Klaksvík - 557 atkvøður


Edmund Joensen, løgtingsformaður, Oyrarbakki - 469 atkvøður


Alfred Olsen, løgtingsmaður, Toftir - 417 atkvøður


John Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn – 287 atkvøður


Katrin Dahl Jacobsen, býráðslimur, Tórshavn - 283 atkvøður


Kári á Rógvi, lógkønur, Tórshavnb - 572 atkvøður


Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, Runavík - 293 atkvøður


Høgni Hoydal, løgtingsmaður og Fólkatingsmaður, Hoyvík - 1261


Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, Hoyvík - 616 atkvøður

# Veljarakanningin rakti væl

**28 av teimum 33 nýggju tingfólkunum vóru røtt, tá Sosialurin vísti myndir av nýggja løgtinginum góða viku fyri valið**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var rættiliga tætt við, at Sosialurin megnaði at seta røttu nøvnini á nýggja løgtingið út frá veljarakanning, sum var gjørd góða viku fyri valið.

Fynd gjørdi veljarakanningina fyri Sosialin, har 2.063 fólk vóru spurd, hvønn flokk tey valdu - og sum nakað serligt, eisini um hvønn persón, tey ætlaðu at velja.

Sjálvandi verður óvissan stór, tá slík kanning verður gjørd, men kortini vísti veljarakanningin nærum rætta úrslitið. Einans fimm av nøvnunum vóru skeiv - og av teimum vóru fleiri, sum nú eru varafólk á tingi - og sum óivað verða at síggja millum nýggju tingmanningina, tá landsstýrið er mannað - tí har verða uttan iva tingmenn og tingkvinnur, sum nú eru á tingi. Landsstýrisfólk skulu leggja tingsessin frá sær í somu løtu, sum tey taka við landsstýrissessinum.


Live á RÁS 2 í kvøld
Valsending kl. 20-22 úr Sjónleikarhúsinum
RÁS 2
Sosialurin
Nr. 8 • Vikuskiftið 11.– 13. januar 2008 • 82. árgangur • Kr. 18,00
Portalurin og Sosialurin á netinum:
FINN TÍTT VALEVNI
Síða 5

HESI KOMA Á TING

Sjey kvinnur høvdu komið á ting, um val var í dag. Teir smáu flokkarnir hava størstu framgongd, meðan Sambandsflokkurin er tann einasti av teimum stóru, sum hevur framgongd. Ein triðingur av tingmanningi er nýggj. Hetta vísir fesk veljarakanning
Síða 23-25

Fynd hevur spurt 2.069 fólk í veljarakanning fyri Sosialin. Umframt at spyrja um flokkar, hevur Fynd eisini spurt, hvønn persón fólk fara at velja

Føroyar ongan rús-politikk
Síða 8-9

Kommunusamanlegging: Vágar standa spyrjandi
Síða 11

Landssjúkrahúsið: Jólakaos skapti øsing
Síða 7

VIKUSKIFTI
Ríkisumboðið sleppur ikki at tosa føroyskt

www.krosstein.fo
Toskatráða -40%
Svend Krosstein
YVIR 500 BRÚKTIR BILAR
HELENA

*Forsíðan á Sosialinum næst seinasta fríggjadag rakti bert fimm tingfólk viðsíðuna, tá blaðið mannaði nýggja tingið út frá veljarakanning*